gult26 cyan26 magenta26 svart26



## TILTØK

### Katólska kirkjan
Í dag kl. 17.30: Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni.

### Adventkirkjan
Leygardagin kl. 11 gudstænasta, Laila og Elly Nielsen.
Eingin bíbliugransking kl. 10 fyrr enn 18. august aftan á summarfrítíðina.

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 17.30 í Hoyvíkar skúla bøn og kl. 18.00 møti við luttøku av teami frá YWAM. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitshúsið
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Ólavi Øre Hansen.

### Ebenezer
Í kvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Sunnudagin: kl. 10.00 breyðbróting, kl. 18.00 evangeliskt møti og kl. 21.00 útimøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 21 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11: Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18: Kvøldmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 22: Útimøti v/ Samkomuni í Hoyvík.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 18 evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20.00: Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Útimøti
Heimamissiónin hevur útimøti leygardagin kl. 19 á Signabø og kl. 21 við missiónshúsið í Kollafirði.

### Filadelfia, Sundalagið
Miðdepilin heldur summarfrí til 22. august, og Urtagarðurin heldur summarfrí til 23. august.
Sunnukvøldið kl. 18: Kvøldmøti v/ Sonna Djurhuus.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18.00 møti við Sam Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 bíbil- og bønarmøti.

### Frá Kelduni í Skálafirði
Leygarkvøldið 14. juli kl. 21.00: Opið hús.
Sunnukvøldið 15. juli kl. 19.00: Møti v/ Martin & Øydis Olsen.
Tú ert vælkomin í Kelduna.

### Meinigheitshúsið á Skála
Sunnukvøldið kl. 19.00 møti við Árant Johannesen, trúb., og Elsu Jacobsen.

### Ørkin, Saltangará
Einki møti verður sunnudagin 15/07.
Húsmøti verður týsdagin kl. 20.00 hjá Jonnu & Palla Højgaard, Saltangará.
Verið hjartaliga vælkomin.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 19.00 møti við Havstein Klein. Evnið verður »Kirkjuliðið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Soli Deo Gloria
Sunnudagin kl. 18.00: Møti við Osvald Thomsen.
Mánadagin kl. 20.00: Bønarmøti.
Mikumorgnum kl. 6.00: Bøn.
Leygarmorgnum kl. 9.00: Bøn saman við Getsemane

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 við Terja og Birgith. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Vági
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### »One Way«, Tvøroyri
Nýggjur handil/café í miðbýnum á Tvøroyri
Tórsdagin 12. juli kl. 15.00 letur upp café og handil við andaligum bókum, fløgum og gávulutum.
Fríggjakvøldið syngur og spælir Teodor Petersen.
Leygarkvøldið er Mourits Viderø gestur.
Kom inn á gólvið og hugna tær við einum góðum kaffimunni í hugnaligum umhvørvi.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR
Sunnudagin 15. juli verður gongutúrur: Postulákirkja – út á Tind. Gingið verður í brattlendi. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

### Lymfødemfelagið
Postrúm 2113,
FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

### Tilhaldið
í Tórsgøtu 21
*Frá 3. juli til 17. august er Tilhaldið opið mánadag-fríggjadag*
kl. 14.00-18.00.
Á ólavsøku 27., 28. og 29. juli kl. 14.00-18.00 verður framsýning av listaverkum hjá Fridtjoffi Joesnen á 1. hædd og í kjallaranum verður framsýning av úrvali av klæðum frá SIRRI. (Suðuroyar Ullvirki)
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

### AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða í kvøld kl. 20–21.00 og kl. 22.30–23.30.

### Al-anon
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

### AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

### AA-fundir í Vágum
Fundir eru í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri)

### Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

### Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
hevur summarfrí frá 28.6. til 3.9.

### LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

### LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

### Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

### Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

### Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

### MBF
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00. Vit hava stongt vegna summarfrí frá 5. juli til 15. august.
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo

### Javni
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email: punta@post.olivant.fo

### Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

### Giktafelag Føroya
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Lýst verður tá opið verður aftur.

### Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.-olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

### Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

### Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

### Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419

### Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

### Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

### Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

### Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

### Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris.
Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið.
Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til
Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

### Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur: fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

## BRÚDLEYP

Í dag kl. 17.00 giftast í Leirvíks kirkju Ann-Mari Hansen úr Leirvík og Jan Erlingsson Petersen úr Klaksvík. Brúdleypsadressan er: Bygdarhúsið í Leirvík.

Leygardagin 14. juli kl. 16.00 giftast í Býráðshúsinum í Klaksvík Eva Eliasen og Heri Jacobsen, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður hildin fyri innbodnum á Klaksvíkar Sjómansheimi.

Leygardagin 14. juli kl. 14.00 giftast í Guldager kirkju Maria Djurhuus Ryggshamar, ættað úr Fuglafirði, og Jesper Olesen, ættaður úr Christiansfeld. Brúdleypsadressan: Festsalurin í Vædderenskvarter nr. 250, 6710 Esbjerg V.

gult27 cyan27 magenta27 svart27



## FILMSTEIGURIN

# Driven



Tann ungi Jimmy Bly (Kip Pardue) hevur sera gott hegni fyri arbeiðinum, sum er av heimsins vandamestu. Hann er rasarakoyrari í amerikanska CART-seriuni, sum er tann sama sum Formel 1, men har ferðin ofta er hægri og koyrt verður á serligum banum kring heimin. Við ferð, sum liggur oman fyri 400 km um tíman á brøttum vegum kann bara tann minsti feilurin hava alt at siga og volda deyða.

Jimmy er komin til tað avgerandi skeiðið í karrieruni, har ambitiøsi manageri hansara, bróðurin DeMille (Robert Sean Leonard) hevur pressað hann so hart, at úrslitini fara at svíkja. Hann er plágaður av smáum feilum, sum nú hava kostað honum sigurin í fleiri kappingum.

Við tí potentiella vandanum at missa meistaraheitið, tekur bossurin, teamánarin, Carl Henry (Burt Reynolds) tað óvanliga stigið at hýra ex CART-stjørnuna, Joe Tanto (Sylvester STallone) til at fáa greiðu á taktikkinum hjá Jimmy.

Tanto var einaferð á ovastu tindum, men ein ræðulig vanlukka setti stopparan fyri karrieru hansara so brátt, sum tað tekur einum CART-koyrarar at renna í ein múr við 300 km ferð um tíman. Nú má Tanto eina ferð fyri allar gera upp við demonarnar í fortíð síni fyri at kunna hjálpa Jimmy til ikki at gera júst sama feilin.

Samstundis roynir hann við vantandi hepni at halda seg burtur frá ex-konu síni, Cathy (Gina Gershon), sum nú er gift fyrrverandi rivalinum hjá Tanto, CART-føraranum Memo Moreno (Christián De La Fuente).

Samstundis birtast heitar kenslur í vinarlagnum við journalistin Lucretia "Luc" Jones (Stacy Edwards), sum skrivar eina greinarøð um hesa ultimativu mannschauvinistisku ítróttargreinina.

Eitt er felags fyri tey øll; hugtøkan av ferð, súsinum, tí oyrasundurskræðandi ganginum, tá 900 hestakreftir verða sleptar leysar í fleiri enn 25 ferðmaskinum í senn. Tað befríandi adrenalinrush, deyðsangistin, ambitiónirnar og minimalir marginalar, sum merkja munin millum katastrofu og sukse…



# Dr. Dolittle 2



Eddie Murphy kemur aftur sum djóralæknin, sum kann tosa við djór. Hesaferð flyta djórini læknan úr síni praksis. Nú við villum djórum…

Tað eru eftirhondini liðin trý ár síðani, at Eddie Murphy sum tann vælbjargaði Dr. Dolittle uppdagaði, at hann kundi tosa við djórini, og tí – best sum hann helt, at hann hevði skotið papageykin – skjótt var á veg í hundarnar.

Dr. Dolittle varð ein gigantisk suksé.

Samantvinningin av klassiskum ævintýri og modernaðari teldutøkni, sum gjørdi tey talandi dýrini 100% verulig, vakti ans bæði hjá vaksnum og børnum kring heimin allan. Og nú er nr. 2 klárur!

Í hesi syftu verður tann góði doktarin tveittur út í eitt stríð millum menniskjarasunnar fyrilitaleysu útnyttan av tilfeingi jarðarinnar og stríðinum hjá djóraheiminum av yvirliva.

Tá Eddie Murphy er við í leikinum, so vita vit ongantíð, hvat vit kunnu vænta…




☆ Tlf. 3119 56 ☆ HAVNAR BIO ☆ www.in.fo/havnarbio ☆




Fríggjadagin 13.07. kl. 19³⁰ Fríggjadagin 13.07. kl. 21³⁰
- frumsýning
Leygardagin 14.07. kl. 19³⁰ Leygardagin 14.07. kl. 21³⁰
Sunnudagin 15.07. kl. 18³⁰ Sunnudagin 15.07. kl. 20³⁰




Fríggjadagin 13.07. kl. 20³⁰ Fríggjadagin 13.07. kl. 23³⁰
- frumsýning
Leygardagin 14.07. kl. 20³⁰ Leygardagin 14.07. kl. 23³⁰
Sunnudagin 15.07. kl. 19³⁰ Sunnudagin 15.07. kl. 22³⁰

☆ BIO KIOSKIN ☆
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.




Fríggjadagin 13.07. kl. 23⁰⁰ Leygardagin 14.07. kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 15.07. kl. 22⁰⁰

www.in.fo/havnarbio